

# Malta – ein óskrivað sendistova

**Malta í Hirtshals, ið Levi Joensen saman við konu síni Margretu rekur sum eina kristna samkomu við støði í brøðrasamkomuni, hevur vunnið sær stóra virðing í Hirtshals og øllum Jútlandi. Malta er stillisliga vorðin ein sendistova, sum øll venda sær til við øllum handans spurningum. Malta er eisini staðið, har tey bert støkka inn á gólvið fáa ein kaffimunn ella bukka beinini eina møtistund**



*Levi og Greta giftust bert 21 og 22 ára gomul. Hennara stilla og sáttliga lyndi er hegnisliga skipanin í tí stóru fólkamongd, tey umgangast, meðan Levi við gangi og skemti og tí serliga kæti, hann er kendur fyri, undirheldur gestunum.*

*Myndir og orð: Dávur Winther*

Malta er fyrst og fremst gróðurstaðið fyri virkseminum hjá Levi í yrki sínum sum trúboðari um alt Jútland. Her búgva Levi og Greta, sum hon verður kallað og hava tey gjørt tað síðan 1984. Ein lítil salur er í veghæddini við stórum køki, so til ber at matgera til rættiliga nógv fólk. Annars búgva Levi og Greta uppiá.

Her verða hildin møti og samkomur – og sunnudag, morgunmøti og sunnudagsskúli.

Møtisalurin á Malta er um at vera ov lítil. Tí verður matarstovan hjá Cosmos Trawl á bryggjuni í Hirtshals eisini nýtt til møtir fyri sjómenn og ferðandi um summari.

Levi og Greta ganga 24 tímar vakt – tað ber altíð til koma í samband við Malta, tá ið ein trongd sál kallar, sigur Levi.

Av tí at Malta er vorið ov lítið, hevur samkoman søkt um, og fingið loyvi til at byggja afturat.

### Øll kenna Levi

Malta liggur á Vinkelvej 2; í Hirtshals – beint uppat gongugøtuni. Uttanfyri er Merkið hvønn dag vundið á stong. Levi er kátur og fyrikomandi og er



*Greta er rósan í dagligdegnum hjá Levi. Tú hevur ikki tosað leingi við Levi, uttan hann hevur nevnt Gretu nakrar ferðir. Greta er í øðrum hvørjum setningi*

ikki lættur at koma uttanum. Hann vil læra fremmand at kenna og hevur eitt innbjóðandi lyndi, sum øll er trygg við.

Levi er vorðin ein býarmynd, sum sæst allastaðni, tó mest á havnarlagnum, har hann hevur havt nógvar tímar bæði sum sjómaður í mong ár, men nú seinnu 25 árini mest sum trúboðari.

Spyr tú mannin á gøtuni
*– hvem er Levi?*

So svara tey aftur
*– det er ham den sjove fra Malta.*

Millum nógvar føroyingar eru Levi og Malta vorðin sjálv ímyndin av Hirtshals.

### Malta ein sendistova

Malta, sum hvønn dag setir Merkið á stong uttanfyri, fær ymiskar uppgávur at loysa fyri ráðaleysir føroyingar. Oftast tí hesi ikki vita annan at venda sær til enn Malta: Gretu ella Levi, sum duga og vita mangt og eru góð í ráðum. Og harafturat eru sera fyrikomandi.

Politiið hevur onkuntíð heitt á Levi, um at hjálpa sær at finna fólk, sum ikki eru komin rættstundis fram til skip ella viðskiftafólk annars. Ella bert at vera teimum hjálpin við onkrum fyrispurningi, sum eftirhondini ikki eru so fáir.

Partur av gerandisdegnum hjá Levi er at vitja sjúkrahúsini í Jútlandi. Tey heita eisini á Levi til serligar vitjanir og eisini at vera hjálpin við at greiða spurningar um fólk, sum eru komin inn, ið tey ikki hava nøktandi upplýsingar um. Tað kemur eisini fyri, at Levi verður boðsendur at siga frá, um hann kennir fólk, sum tey einki vita um.

Eisini tá sjúklingar, sum eru lammaðir og eru ringir at skilja, ella bert eldri og ikki eru so køn í donskum, verður heitt á Malta um at fáa vitjan á sjúkrahúsunum.

Politi, hevur onkuntíð heitt á Levi at hjálpa sær at finna persónar, sum ikki eru komin rættstundis fram til skipa ella viðskiftafólk annars.

Hesar uppgávur eru nógvar og tíðarkrevjandi, men Levi ger tær við gleði, hóast tær ikki eru álagdar honum. Levi hevur ein sera stóran vinar- og kenningarskari, sum eru honum hjálpin í hesum arbeiði.

Fólk, ið eru á serligum viðgerðarstovnum um Hirtshaltsleiðina koma ofta til Malta, tí tey kenna sær ein serliga tryggleika og heimligan kærleika har. Í førum er talan um fólk, ið eru illa heitin, sum bert kenna sær Malta, Levi ella Gretu at fara til. Her kenna tey sær ein linna og umsorgan av serligum slag.

Fólk ringir úr Føroyum við alskyns spurningum, sum Levi og Greta síðani royna at svara eftir førimuni – ofta við hjálp av fleri ymiskum myndugleikum og stovnum í Danmark.

Jú, fyrispurningar av øllum handans slagi koma allar tíðir á døgninum til Gretu og Levi. Tí kann av røttum verða sagt, at Levi og Greta eru á 24 tímars vakt í virki sínum á Malta. Tá ið eg skuldi seta bilin frá mær uttanfyri Malta um náttina, legði Levi dýran við ikki at seta bilin, so hann ikki slapp út við sínum, tí hann kundi allar tíðir á døgninum verða kallaður út til okkurt.